# Teir sum fórust við Nólsoy

Henriksen úr Sandavági.

Hetta gevur grundarlag fyri eini sera áhugaverda søgu. Men fyrst skal sigast, at við hesum forlissinum var tað á sama hátt, sum við so nógvum øðrum forlissum. Fólk gingu í óvissu. Skipini plagdu at koma heim ávísa tíð, og tað komu tey flestu eisini. Men so vóru tað onnur, sum ikki komu vegin fram. Her var einki annað at gera enn at bíða og vóna, men sum dagarnir gingu minkaði vónin, og ein dag varð so staðfest, at skipið var farið og kom ikki aftur.

Men aftur til ringin hjá Bernhard, sum henda vakra søgan kom burturúr. Gentan hjá Bernhard var Anna Jacobsen, eisini úr Sandavági. Tey bæði høvdu verið trúlovað í 4 ár og høvdu havt ring í hálvt annað ár. Tá í tíðini varð ikki lopið framav á hesum økinum við at giftast í skundi.

Bernhard varð jarðaður á Eyrabakka og á grøv hansara stendur ein vakur minnissteinur, sum Óli Arge, e, hevur gjørt. Har standa eisini nøvnini á hinum, sum fórust við Nólsoy.

Anna fekk ringin sendandi, og hon lat gera eitt hjarta, sum hon setti á ringin, og bar hon hann allar sínar dagar. Hon giftist ongantíð, og hon doyði í 1972, bert 65 ára gomul.

Ein slíkur skaðatilburður elvdi sjálvsagt til stóra sorg hjá teimum nærmasta. Í hesum førinum vóru tveir beiggjar farnir. Hin kallaðist Johannes.

Men teir báðir deyðu hjálptu sjálvir sínum næstu at koma yvir sorgina. Eina náttina droymdi systirin Elsa, at tað varð bankað uppá hurðina. Í fyrsta umfari latst hon sum einki, men so varð rópt: "Elsa, lat upp." Hon so gjørdi. Tá stóðu beiggjarnir báðir uttanfyri í líki av einglum. Teir hildu um hvønn annan og søgdu við systrina: "Syrg ikki meira yvir okkum. Vit hava tað gott!".



*Í **miðjuni** skiparin Hans David Hansen. **Ovara rað f.v.** Sámal Jákup Jacobsen, Hósvík, Vilhelm Hansen, Hósvík, Magnus Pauli Hansen, Hósvík, Óli Jákup Jacobsen, Oyrabakki. **Niðara rað:** Meinhard Petersen, Hósvík, Jóan Petur Petersen, Hósvík, Jóhannes Olsen, Hósvík, Alif Danberg, Hósvík*



***Ovara rað:** Jens Christian Petersen, Kollafirði, Hans Jákup Eidesgaard, Eiði, Petur Joensen, Sandi, Bernhard Henriksen, Sandavágur. **Niðara rað:** Jógvan Nybo, Hvítanesi, Hans Andreas Johansen, Eiði, Magnus Poulsen Kollafirði, Poul Martin Johansen, Eiði, Jóhannes Hendriksen, Sandavágur.*
*Her resta tvær myndir, Edvard Hansen og Poul Poulsen úr Hósvík. Tær koma í einum seinni parti í hesi røð*

## Bíðaði heilan túr eftir "ja" frá gentuni

Í samband við Bernhard er eisini ein onnur áhugaverd søga, og tað er dagbókin hjá honum. Hon er frá árinum 1930. Bernhard hevði skrivað niður fyri hvønn dag í árinum tað, sum hann hevur upplivað, t.v.s. bæði á landi og sjógvi. Hetta er tískil ein samtíðarsøga frá einum tíðarskeiði, sum liggur nærum 80 ár afturi í tíðina. Her fæst eisini ein mynd av eini persónligheit, sum vit eisini hava fingið váttað av teimum, sum mintust Bernhard.

Bernhard var virkin missiónsmaður, og hann var eisini blákrossari. Hann var sera fittur í hondunum og millum annað bant hann bøkur inn, tá ið hann var heima.

Dagbókin hjá honum er eisini um kærleikssøgu hansara. Hann hevði hug á Onnu, men fekk ikki sagt tað við hana, áðrenn hann fór til Havnar at rigga til at fara til skips á vári 1930. Dagin fyri, at teir fara avstað, sendir hann henni bræv um hetta. So túrurin gekk við at hugsa um, hvat svarið mundi fara at vera.

Hann fer avstað, og nú er spenningurin at fáa bræv frá Onnu. Men túrurin kemur til enda, og teir fara heim uttan, at hava verið inni har, sum brøvini eru send!

Tá hann kemur heim aftur, vísir tað seg, at hon hevur somu hugsan sum hann, og Bernhard kann nú kalla seg forlovaðan.

## Framúr lýsing av fiskimanni

Frásøgnin hjá Bernhard er ein einastandandi lýsing av lívinum umborð á eini slupp og umstøðunum tá. Millum annað greiðir hann frá teirri stóru broyting, táið teir fingu radio umborð, og tað bar til at lurta eftir sendingum ymsastaðni frá í heiminum. Sjálvir var Bernhard kokkur, so tað lá væl fyri hjá honum at lurta. Tað, sum hann sjálvur legði størstan dent á, vóru tær gudstænastur hann hoyrdi, millum annað úr Stockholm, har hann eisini skilti hvørt orð.

Og so greiðir hann frá, hvussu stórt afturstig tað var, tá radio gjørdist í ólagi, og einki hoyrdist.

Bernhard greiðir eisini frá, hvussu hann sum fiskimaður upplivdi sáttmálasamráðingarnar í 1930, tá tað veruliga var útlit fyri verkfalli. Men semja gjørdist og teir fóru avstað sum ætlað.

Tað sum eisini lýsir lyndið hjá Bernhard er, at fyri dag hann skrivar endar hann við: "Alt væl".

Hetta árið í 1930 var Bernhard við "Suðuroy", sum eisini var eitt skip hjá Müllerreiðarínum. Skiparin var tann sami Hans David, so teir eru farnir saman av Suðuroy umborð á Nólsoy.

## Min elskaði Bernhard fór til gravar

Anna hevur eisini sjálv skrivað í dagbókina hjá Bernhardi, eftir at hann er farin. Og skal partur av hesum endurgevast. Hetta lýsir eisini, at talan hevur verið um eitt serligt og álvarsamt par.

Anna skrivar aftast í dagbókina hjá Bernhardi:

*"9. juni 1934 fór Bernhard mín elskaði til gravar á Eyrabakka í Íslandi. Hann hevði fylt 32 ár tann 29. desember.*